

# Avloysarastarv fyri rektaran á Miðnámi á Kambsdali

Hevur tú hugsjónir um skúla og miðnámsútbúgvingar og ynskir at slóða fyri fakligari og námsfrøðiligari menning innan økið, hevur tú nú møguleika at bjóða teg fram sum virkandi rektara á Miðnámi á Kambsdali fram til 1. august 2025 við møguligari leingjan eftir hetta eitt skúlaár í senn.

Saman við Miðnámi á Kambsdali er rektarin eisini ovasti leiðari á Klaksvíkar HF-skeiði og Fablab á Kambsdali.

## Ábyrgd og uppgávur

Rektarin hevur mótvegis landsstýrismanninum ábyrgdina av øllum virkseminum í miðnámsskúlanum, og er dagligi leiðari skúlans. Hann hevur ovastu leiðsluábyrgdina av øllum virkseminum í skúlanum, herundir fakliga, námsfrøðiliga, umsitingarliga og fíggjarliga ábyrgd. Rektarin skal mynda skúlan á ein sannførandi hátt og virka fyri góðum og mennandi arbeiðs- og lestrarumhvørvi, umframt at virka fyri trivnaði í skúlanum.

Rektarin skal standa á odda fyri at skapa eitt gott arbeiðsumhvørvi og tryggja gott samstarv við allar partar. Rektarin skal somuleiðis virka fyri góðum samstarvi við aðrar skúlar, vinnuna o.o. Saman við Barna- og útbúgvingarmálaráðnum skal rektarin menna útbúgvingar skúlans, so tær alsamt lúka framtíðar og altjóða krøv. Rektarin hevur fíggjarligu ábyrgdina, skal leggja fíggjarætlan stovnsins og skipa ein skynsaman rakstur við neyvari fíggjarstýring. Rektarin setir í starv og loysir úr starvi leiðarar, lærarar og onnur starvsfólk.

## Persónurin

Rætti persónurin til rektarastarvið skal hava hug og hegni at leiða og skal kenna egnar dygdir og avmarkingar. Tað er týdningarmikið, at rektarin hevur evni og vilja at samstarva og samskipa, men samstundis styrkina at kunna standa eina í mótstøðu, uttan at missa fótafestið.

Starvið krevur, at tú skjótt dugir at skapa tær eitt yvirlit í skiftandi støðum og megnar at røkka settum málum. Tú skalt vera framskyggin og hava evni og áræði at ganga nýggjar leiðir.

Tú skalt hava góð evni at samstarva og samskifta og við einum stimbrandi leiðsluhátti at birta eldhuga millum hesi. Tú skal síggjast í starvinum og skapa virðing og trivnað innanhýsis millum starvsfólk og næmingar umframt uttanhýsis við samstarvspartar o.o.. Umráðandi er at skapa trúvirði, vera álítandi og duga væl at lýsa egin sjónarmið. Tú skalt evna innliving og virðing fyri hugskotum og sjónarmiðum hjá øðrum.

## Førleikar og royndir

Tað er eitt krav, at rektarin hevur:

- viðkomandi útbúgving frá hægri lærustovni,
- leiðslu- og fyrisitingarligar royndir,
- royndir og førleika at undirvísa,
- góð evni at samskifta og orða seg á føroyskum, skandinaviskum og enskum.

Harumframt er tað ein fyrimunur, at rektarin hevur leiðsluútbúgving við innliti í organisatión. Í sambandi við triðja byggistig í umbygging og útbygging av miðnámsskúlanum á Kambsdali skal rektarin skipa fyri, at dagliga virksemi í skúlanum heldur fram ótarnað, meðan byggingin fer fram, umframt at verða við í skipanini av bygginini.

## Setanar- og lønartreytir

Starvið er flokkað samsvarandi 38. lønarflokki sambært Tænastumannafelag Landsins, tó uttan at vera tænastumannastarv. Lønin er í løtuni kr. 58.806,13 umframt 15 % í eftirløn um mánaðin.

## Umsókn

Umsókn við CV, prógvum o.ø. skal sendast til:

Barna- og útbúgvingarmálaráðið
J. H. Schrøtersgøta 7
Postsmoga 3279
110 Tórshavn
T-postur til bumr@bumr.fo

Umsóknin skal verða Barna- og útbúgvingarmálaráðnum í hendi í seinasta lagi sunnudagin **15. oktober 2023**. Starvið verður sett skjótast til ber ella eftir nærri avtalu.

Nærri upplýsingar um starvið kunnu fáast við at venda sær til Poul Geert Hansen, aðalstjóra í Barna- og útbúgvingarmálaráðnum, á tlf. 555010 ella t-post PoulGeertH@bumr.fo.

*Miðnám á Kambsdali bjóðar út búskaparbreyt, hugbreyt, náttúrubreyt, fyrireikingarbreyt, serbreyt, FHS yrkisnám, akademiútbúgving og í samstarvi við tríggjar aðrar norðurlendskar skúlar norðuratlantiska studentaflokkin. Klaksvíkar HF-skeið bjóðar út fyrireikingarbreyt. Tað eru umleið 590 næmingar og 100 starvsfólk knýtt at stovninum samanlagt. Samlaða rakstrarjáttanin til økið er 53,5 milliónir í 2023. Sí annars heimasíðu skúlans: www.kambsdalur.fo*

BARNA- OG ÚTBÚGVINGARMÁLARÁÐIÐ